SPEKT | løggildir grannskoðarar

# P/F Elektron

**Staravegur 9**
**Postboks 3219**
**110 Tórshavn**

**Skrás.nr.100**

## Ársfrásøgn fyri 2025

Ársfrásøgnin er løgd fram og góðkend á ársaðalfundi felagsins hin 22. apríl 2026

Helga á Borg
Fundarstjóri

# Innihaldsyvirlit

**Síða**

**Átekningar**

| | |
|---|---|
| Leiðsluátekning | 1 |
| Grannskoðanarátekning frá óheftum grannskoðara | 2 |

**Leiðslufrágreiðing**

| | |
|---|---|
| Upplýsingar um felagið | 5 |
| Høvuðs- og lyklatøl | 6 |
| Leiðslufrágreiðing | 7 |

**Ársroknskapur**

| | |
|---|---|
| Nýttur roknskaparháttur | 10 |
| Rakstrarroknskapur 1. januar - 31. desember 2025 | 18 |
| Fíggjarstøða tann 31. desember 2025 | 19 |
| Peningastreymsuppgerð 1. januar - 31. desember 2025 | 21 |
| Notur til ársfrásøgnina | 22 |

# Leiðsluátekning

Nevndin og stjórnin hava í dag viðgjørt og góðkent ársfrásøgnina fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2025 fyri P/F Elektron.

Ársfrásøgnin er greidd úr hondum í samsvari við ársroknskaparlógina.

Vit meta, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðu felagsins tann 31. desember 2025 umframt av felagsins virksemi og peningastreymi felagsins fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2025.

Vit meta, at leiðslufrágreiðingin inniheldur eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøður.

Ársfrásøgnin verður løgd fram til góðkenningar ársaðalfundsins.

Tórshavn, tann 22. apríl 2026

**Stjórn**

Ulla Joensen
stjóri

**Nevnd**

| | | |
|---|---|---|
| Jean Djurhuus<br>formaður | Brian Smedemark<br>næstformaður | Poul Marner Mortensen |
| Jan Ziskasen | George Poulsen<br>starvsfólkavalt umboð | Tim Kristoffer Wentzlau<br>starvsfólkavalt umboð |

# Grannskoðanarátekning frá óheftum grannskoðara

***Til kapitaleigararnar í P/F Elektron***

## Niðurstøða

Vit hava grannskoðað  ársroknskapin hjá P/F Elektron fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2025 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu, peningastreymsupp-gerð og notum. Ársroknskapurin er gjørdur eftir ársroknskaparlógini.

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu tann 31. desember og úrslitinum av virksemi felagsins og peningastreymi í roknskaparárinum 1. januar - 31. desember 2025 samsvarandi ársroknskaparlógini.

## Grundarlag fyri niðurstøðuni

Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og eftir øðrum ásetingum í føroysku grannskoðaralógini. Okkara ábyrgd sambært hesum standardum og krøvum er nærri lýst í grannskoðanarátekningini í pettinum “Ábyrgd grannskoðarans av grannskoðanini av ársroknskapinum“. Vit eru óheft av felagnum samsvarandi reglunum hjá International Ethics Standards Board for Accountants (IESBA Code) um etiskan atburð hjá grannskoðarum og øðrum ásetingum, ið eru galdandi í Føroyum, eins og vit hava hildið etisku skyldurnar, hesum krøvum og IESBA Code. Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

## Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við ársroknskaparlógina. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til fyri at gera ársroknskapin uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Tá ið ársroknskapurin verður gjørdur, hevur leiðslan ábyrgdina av at meta um, hvørt felagið megnar at halda fram við rakstrinum, og har tað er viðkomandi at upplýsa um viðurskifti viðvíkjandi framhaldandi rakstri og at gera ein ársroknskap eftir roknskaparásetingunum um framhaldandi rakstur, uttan so at leiðslan hevur ætlanir um at avtaka felagið, steðga rakstrinum ella um leiðslan í roynd og veru ikki hevur aðrar møguleikar.

## Grannskoðanarátekning frá óheftum grannskoðara

### Ábyrgd grannskoðarans av grannskoðanini av ársroknskapinum

Endamál okkara er at fáa eina grundaða vissu fyri, at ársroknskapurin sum heild er uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, og at gera eina grannskoðanarátekning við eini niðurstøðu. Grundað vissa er vissa á høgum stigi, men er tó ikki ein trygd fyri, at grannskoðan framd samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, altíð kann avdúka týðandi skeivleikar, um slíkir eru. Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað sviki ella mistøkum og mugu metast at verða týðandi, um tað er sannlíkt, at teir hvør sær ella saman kunnu metast at hava ávirkan á fíggjarligu avgerðirnar, ið roknskaparbrúkararnir taka við støði í ársroknskapinum.

Tá ið vit grannskoða samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum í føroysku grannskoðaralógini, gera vit yrkisligar metingar og varðveita professionella ivasemið undir grannskoðanini. Harumframt:

- Eyðmerkja og meta vit um váðan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og grannskoða samsvarandi hesum váða og fáa til vega grannskoðanarprógv, ið eru nóg góð og egnað sum grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri, at vit ikki avdúka týðandi feilir orsakað av sviki, er størri enn váðin fyri, at feilir orsakað av mistøkum ikki verða avdúkaðir, av tí at svik kann umfata samansvørjing, skjalafalsan, ætlað dyljan, villleiðing ella at innanhýsis eftirlit verða skúgvað til viks.

- Fáa vit fatan av tí innanhýsis eftirliti, ið er viðkomandi fyri grannskoðanina, soleiðis at vit kunnu leggja grannskoðanina til rættis á nøktandi hátt eftir umstøðunum, men ikki fyri at gera eina niðurstøðu um, hvussu virkið innanhýsis eftirlitið er.

- Taka vit støðu til, um tann av leiðsluni nýtti roknskaparháttur er hóskandi eins og vit meta um, hvørt roknskaparligu metingarnar og tilhoyrandi upplýsingar frá leiðsluni eru rímiligar.

- Taka vit støðu til, um tað er hóskandi, at leiðslan hevur valt at gera ársroknskapin grundað á roknskaparháttin um framhaldandi rakstur, og um tað, við støði í teimum grannskoðanarprógvum, ið eru fingin til vega, er týðandi óvissa ella viðurskifti, ið kunnu elva til týðandi óvissu um, hvørt felagið megnar at halda áfram. Er niðurstøðan, at tað er týðandi óvissa, skulu vit gera vart við hetta í grannskoðanarátekningini við at vísa til upplýsingar hesum viðvíkjandi í ársroknskapinum ella, um hesar upplýsingar ikki eru nøktandi, tillaga okkara niðurstøðu. Okkara niðurstøður eru grundaðar á tey grannskoðanarprógv, ið eru fingin til vega fram til dagin, tá ið okkara grannskoðanarátekning verður undirskrivað. Hendingar í framtíðini ella viðurskifti kunnu tó elva til, at felagið ikki er ført fyri at halda fram við rakstrinum.

# Grannskoðanarátekning frá óheftum grannskoðara

- Taka vit støðu til samlaðu framløguna, bygnaðin og innihaldið í ársroknskapinum, íroknað upplýsingarnar í notunum umframt um ársroknskapurin vísir transaktiónir, sum liggja undir, og hendingar á ein slíkan hátt, at tað gevur eina rættvísandi mynd.

Vit samskifta við leiðsluna um millum annað vavið á ætlaðu grannskoðanini og nær vit vænta at grannskoða, og samskifta um týðandi eygleiðingar, so sum møguligar týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, ið vit koma fram á í sambandi við grannskoðanina.

**Ummæli av leiðslufrágreiðingini**

Leiðslan hevur ábyrgdina av leiðslufrágreiðingini.

Okkara niðurstøða um ársroknskapin fevnir ikki um leiðslufrágreiðingina, og vit geva ikki nakra váttan við vissu um leiðslufrágreiðingina.

Tað er okkara ábyrgd, í sambandi við grannskoðanina av ársroknskapinum, at lesa leiðslufrágreiðingina og í hesum sambandi meta um, hvørt samanhangur er millum leiðslufrágreiðingina og ársroknskapin, ella um hon er í mótsøgn við ta vitan, ið vit hava fingið undir grannskoðanini, ella á annan hátt er tengd at týðandi skeivleikum.

Okkara ábyrgd er harumframt at hugsa um hvørt leiðslufrágreiðingin hevur kravdu upplýsingarnar samsvarandi ársroknskaparlógini.

Grundað á gjørda arbeiðið er tað okkara fatan, at leiðslufrágreiðingin samsvarar við ársroknskapin, og at hon er gjørd samsvarandi krøvunum í ársroknskaparlógini. Vit eru ikki vorðin varug við týðandi feilir í leiðslufrágreiðingini.

Tórshavn, hin 22. apríl 2026

SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f

Finnbjørn Zachariasen
statsaut. revisor

## Upplýsingar um felagið

| | |
|---|---|
| **Felagið** | P/F Elektron<br>Staravegur 9<br>Postboks 3219<br>Tórshavn<br><br>Skrás.nr.: 100<br>Roknskaparár: 1. januar - 31. desember |
| **Nevnd** | Jean Djurhuus, formaður<br>Brian Smedemark, næstformaður<br>Poul Marner Mortensen<br>Jan Ziskasen<br>George Poulsen<br>Tim Kristoffer Wentzlau |
| **Stjórn** | Ulla Joensen, stjóri |
| **Grannskoðan** | SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f<br><br>Staravegur 17<br>110 Tórshavn |

## Høvuðs- og lyklatøl

Gongdin hjá felagnum seinastu 5-árini kann lýsast við hesum høvuðs  og lyklatølum:

| | 2025 | 2024 | 2023 | 2022 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| | tkr. | tkr. | tkr. | tkr. | tkr. |
| **Høvuðstøl** | | | | | |
| **Úrslit** | | | | | |
| Bruttoúrslit | 77.157 | 66.703 | 62.308 | 62.449 | 60.584 |
| Úrslit áðrenn fíggjarpostar | 16.595 | 15.910 | 16.399 | 18.296 | 18.674 |
| Úrslit frá fíggjarpostum | -500 | -248 | -18 | -164 | -1.107 |
| Ársúrslitið | 13.186 | 12.827 | 13.426 | 14.861 | 15.702 |
| **Fíggjarstøða** | | | | | |
| Fíggjarstøðujavni | 105.294 | 97.116 | 76.161 | 68.499 | 57.301 |
| Eginogn | 69.686 | 61.800 | 54.073 | 43.347 | 34.486 |
| **Peningastreymur frá:** | | | | | |
| - rakstrarvirksemi | 17.798 | 9.787 | 19.821 | 17.878 | 16.656 |
| - íløguvirksemi | -8.409 | -12.518 | -8.799 | -3.541 | -626 |
| - Íløgur í materiella støðisogn | -8.409 | -12.518 | -8.845 | -3.541 | -626 |
| - fíggingarvirksemi | -7.871 | 4.750 | -6.000 | -4.000 | -20.057 |
| Broytingar í tøkum peningi í árinum | 1.517 | 2.019 | 5.022 | 10.337 | -4.027 |
| Starvsfólkatal | 67 | 65 | 60 | 59 | 57 |
| **Lyklatøl** | | | | | |
| Høvuðsavkast | 16,4% | 18,4% | 22,7% | 29,1% | 31,1% |
| Tryggleikastig | 66,2% | 63,6% | 71,0% | 63,3% | 60,2% |
| Eginpeningsavkast | 20,1% | 22,1% | 27,6% | 38,2% | 54,8% |
| Gjaldførislutfall | 169,8% | 169,7% | 182,4% | 148,2% | 116,3% |

Lyklatølini eru greidd úr hondum samsvarandi viðmælum og vegleiðingum frá Den Danske Finansanalytikerforening. Víst verður til allýsingar í pettinum um nýttan roknskaparhátt.

# Leiðslufrágreiðing

## Høvuðsvirksemi felagsins

Høvuðsvirksemi felagsins er at veita KT-loysnir til fyritøkur og stovnar. KT-loysnir fevna um skipanarmenning og -rakstur, hýsing, kunningartænastur og KT-trygdarráðgeving.

## Fíggjarlig lýsing

Ársroknskapurin hjá Elektron vísir eitt yvirskot áðrenn skatt á 16,1 mió.kr. og eftir skatt á 13,2 mió.kr. Fíggjarstøðan javnvigar við 105,3 mió.kr., og eginognin er bókað til 69,7 mió.kr.

Bruttoúrslitið var 77,2 mió.kr. í 2025. Hetta er 10,4 mió.kr. meira enn árið fyri. Starvsfólkakostnaðurin øktist við 7,5 mió.kr. í 2025 úr 48,0 mió.kr. til 55,5 mió.kr. Í árinum hevur verið ein netto tilgongd av 4 starvsfólkum og ársverkini eru hækkaði úr 65 til 67 ársverk. Lønarkostnaðurin er hækkaður orsaka av hesum og orsaka av sáttmálabundnum lønarhækkingum og øðrum tillagingum.

Avskrivingarnar vóru 5,1 mió.kr. í 2025 í mun til 2,8 mió.kr. árið fyri. Netto fíggjarkostnaðirnir vóru 0,5 mió.kr.

Í árinum hevur Elektron framt íløgur fyri 8,4 mió.kr. Við ársenda 2025 hevði felagið ein tøkan pening upp á 31,6 mió.kr.

## Virksemi felagsins

Virksemi hjá Elektron er skipað í eina menningardeild og eina rakstrar- og tøknideild.

Menningardeildin ráðgevur, mennir, viðlíkaheldur og rekur eina røð av skipanum fyri kundar á føroyska marknaðinum. Skipanarumhvørvið er fjøltáttað og Elektron hevur víðfevnda forrætningsvitan um sentralar talgildar skipanir í Føroyum. Sum dømi um skipanir, ið Elektron hevur metn og viðlíkaheldur, kunnu nevnast Skattaskipan, Tollavgreiðsluskipan, Lønarskipan, Mínrokning, Løgtingsskipan, Ognarmetingarskipan og Tíðar- og skrásetingarskipan. Harafturat hevur Elektron ment ymiskar brúkaravendar talgildar tænastur, eitt nú Vinnu- og borgaragluggin og Lønarportalin.

Fleiri av skipanunum vera brúktar av stórum parti av føroyska fólkinum, meðan aðrar vera nýttar av fyritøkum og almennum stovnum í dagliga virkseminum. Hetta krevur breitt innlit í føroyska marknaðin, serførleika til talgilt undirstøðukerki, samfelagskritiskt infrakervi og KT-trygd.

# Leiðslufrágreiðing

Rakstrar- og tøknideildin veitir eina røð av tænastum til føroyska marknaðin. Hýsingartænasturnar frá Elektron fevna frá samhýsing til samansettar heildarloysnir og verða veittar alt samdøgnið árið runt. Tænasturnar verða veittar við høgum krøvum til trygd og rakstrarstøðufesti. Harumframt bjóðar Elektron netloysnir, trygdaravrit og integratiónsloysnir til ymiskar skipanir.

Deildin veitir eisini brúkarasupport til skipanir sum Samleikan, Vangan og Mínrokning. Harumframt veitir Elektron printtænastur og eina makkuleringsloysn, tí tryggjar trygga burturbeining av útgerð við trúnaðarupplýsingum.

Virksemi hjá Elektron verður framt undir strongum trygdarkrøvum. Tænastuvirksemið hevur í mong ár verið KT-grannskoðað og felagið er eisini certifiserað eftir ISO/IEC 27001:2022. Certifiseringin er við til at tryggja, at dátur og upplýsingar hjá bæði felagnum og kundum verða handfarnar á ein tryggan og skipaðan hátt.

**Vinningsbýti**

Nevndin skýtur upp, at útluta 5,3 mió.kr. í vinningsbýti í 2025.

**Íløgur**

Í 2025 hevur Elektron framt íløgur fyri 8,4 mió.kr. Av hesum eru 7,5 mió.kr. brúktar til útgerð tilundirstøðukervið.

Íløgurnar styrkja rakstrarstøðufesti og mótstøðuføri og trygd í tænastunum.

**Váðar**

Marknaðurin er í støðugari broyting, og Føroyar verða alsamt meira samantvinnaðar við talgilda heimin. Hetta setur størri krøv til KT-trygd, brúkaravinsemi og smidleika í veittu tænastunum.

Spenta geopolitiska støðan í heiminum økir eisini um váðan fyri netálopum og ófriðurin ávirkar eisini heimsmarknaðin og hevur ført við sær hækkandi prísir á tøkniligari útgerð.

Elektron fylgir støðugt gongdini og arbeiðir áhaldandi við menning av tænastum, so felagið eisini frameftir kann nøkta tørvin hjá kundum samstundis sum eitt høgt trygdarstøði verður tryggjað.

# Leiðslufrágreiðing

## Uttanhýsis umhvørvi

Virksemið hjá felagnum hevur lutfalsliga avmarkaða umhvørvisávirkan. Arbeitt verður tó áhaldandi við at minka um orkunýtsluna, m.a. við at umleggja tøkni til meira orkuvinarligar loysnir.

Talgildar tænastur, sum Mínrokning og Mínboks, eru eisini við til at minka um pappírs- og prentnýtsluna í Føroyum. Nýggja orkuloysnin, ið var endaliga verksett í 2024, er eisini við til at minka um $CO_2$-útlátið.

## Vitanarstøði

Elektron leggur stóran dent á at tryggja høgt fakligt støði í øllum pørtum av virkseminum. Vitanardeiling millum starvsfólk, menning av nýggjum loysnunum og djúpt innlit í kundatørv eru avgerandi fyri felagið.

Fyri at veita tryggar og álítandi tænastur krevst, at starvsfólkini arbeiða við fjølbroyttum uppgávum, har kreativitetur, skjótar loysnir og høgt trygdarstøði eru í miðdeplinum.

## ESG-frágreiðingar

Elektron hevur seinastu árini gjørt eina ESG-frágreiðing, sum lýsir lyklatøl innan umhvørvi, starvsfólk og leiðslu.

Endamálið er m.a. at seta ítøkilig burðardygg mál fyri virksemið og at gera tað møguligt hjá starvsfólkum, kundum, íleggjarum og øðrum áhugaðum at fylgja gongdini ár eftir ár.

ESG-frágreiðingin fyri 2025 verður kunngjørd í sambandi við framløguna av ársroknskapinum.

## Framtíðarútlit

Ótrygga støðan í heiminum skapar framvegis ávísa óvissu um gongdina á marknaðinum. Tað er tí trupult at meta nágreiniliga um ávirkanina á virksemið hjá Elektron og kundunum hjá felagnum.

Eftirspurningurin eftir talgildum tænastum er tó framvegis stórur. Elektron veitir KT-tænastur til føroyska marknaðin og hevur drúgvar royndir innan menningar- og hýsingartænastur.

## Hendingar eftir roknskaparlok

Frá degnum fyri fíggjarstøðuni til í dag er einki hent, sum ávirkar metingina av ársroknskapinum.

# Nýttur roknskaparháttur

Ársfrásøgnin hjá P/F Elektron fyri 2025 er gjørd í samsvari við ásetingarnar í ársroknskaparlógini fyri feløg í bólki C miðal.

Tann nýtti roknskaparhátturin er óbroyttur í mun til síðsta ár.

**Um innrokning og virðisáseting**

Inntøkur verða innroknaðar í rakstrarroknskapin, so hvørt sum tær verða vunnar. Harumframt verða virðisjavningar av fíggjarligum ognum og skyldum innroknaðar. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis allir kostnaðir, íroknað avskrivingar og niðurskrivingar, innroknaðir.

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið í framtíðini fær fíggjarligar ágóðar, og virðið á ognini kann gerast upp álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið í framtíðini skal av við fíggjarligar ágóðar, og virðið á skylduni kann gerast upp álítandi.

Til at byrja við verða ognir og skyldur innroknaðar til kostprís. Síðani verða ognir og skyldur virðisásettar, sum lýst niðanfyri fyri einstøku roknskaparpostarnar.

Ávísar fíggjarligar ognir og skyldur verða virðisásettar til amortiseraðan kostprís, og sostatt verður ein konstant effektiv renta innroknað yvir gildistíðina. Amortiseraður kostprísur verður uppgjørdur sum upprunaligur kostprísur við frádrátti av møguligum avdráttum og ískoyti/frádrátti av samlaðu amortiseringini av muninum millum kostprís og áljóðandi virði.

Í sambandi við innrokning og virðisáseting verður hædd tikin fyri væntaðum tapum og vandum, sum íkoma áðrenn ársfrásøgnin verður løgd fram, og sum sanna ella avsanna viðurskifti, ið vóru til staðar fíggjarstøðudagin.

## Rakstrarroknskapurin

**Bruttoúrslit**

Felagið nýtir ásetingina í § 32 í ársroknskaparlógini og tískil er nettosølan ikki upplýst.

**Nettosøla**

Nettosøla frá sølu av vørum og tænastum verður innroknað í rakstrarroknskapin, um váðaskifti, sum oftast í sambandi við útflýggjan til keypara, er farið fram og um inntøkan kann gerast upp álítandi og væntast móttikin.

# Nýttur roknskaparháttur

Nettosølan verður virðisásett til dagsvirðið av avtalaðu samsýningini uttan mvg og avgjøld, sum eru uppkravd vegna triðjapart. Øll sløg av givnum avsláttrum verða innroknað í søluna.

Harumframt verður arbeiði í gerð fyri fremmanda rokning innroknað, so hvørt sum tað verður útført. Nettosølan svarar tískil til søluvirði av útførda arbeiðinum í árinum (framleiðsluhátturin). Nettosølan frá arbeiði í gerð verður innroknað, tá samlaðu inntøkurnar og kostnaðirnir á ordrunum, og í hvønn mun arbeiði er liðugt við ársroknskaparlok, kann uppgerast álítandi, og tá tað er sannlíkt, at fíggjarligur fyrimunur, herundir inngjaldingar, kann falla felagnum í lut.

**Aðrir uttanhýsis kostnaðir**

Aðrir uttanhýsis kostnaðir fevna um kostnaðir til útbreiðslu, sølu, lýsingar, umsiting, høli, tap uppá skuldarar v.m.

**Starvsfólkakostnaður**

Starvsfólkakostnaður fevnir um lønir, íroknað frítíðarløn og eftirlønir umframt aðrar kostnaðir til sosiala trygd v.m. til starvsfólk felagsins. Móttikin endurgjøld frá almennum myndugleikum eru drigin frá starvsfólkakostnaðinum.

**Av og niðurskrivingar**

Av og niðurskrivingar fevna um ársins av- og niðurskrivingar upp á materiella støðisogn.

**Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir**

Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir fevna um rentur, kursvinning og -tap viðvíkjandi virðisbrøvum, skuld og flytingar í fremmandum gjaldoyra, amortisering av fíggjarligum ognum og skyldum.

**Skattur av ársúrslitinum**

Skattur av ársúrslitinum fevnir um partafelagsskatt og broyting í útsettum skatti, íroknað broytingar ið stava frá broyting í skattastigi. Skattur, sum viðvíkur ársúrslitinum, verður innroknaður í rakstrarroknskapin og skattur, sum viðvíkur bókingum beinleiðis á eginognini, verður innroknaður beinleiðis á eginognina.

# Nýttur roknskaparháttur

## Fíggjarstøðan

### Materiell støðisogn

Grundøki og bygningar verða virðisásett til dagsvirði fíggjarstøðudagin. Uppskriving til dagsvirði verður skrásett beinleiðis á ein uppskrivinginargrunn undir eginognini.

Uppskrivingar verða afturfluttar í tann mun, at dagsvirði fellur. Um dagsvirði er lægri enn søguligi kostprísurin, verður roknskaparliga virði niðurskrivað til lægra dagsvirði. Tann parturin av niðurskrivingini, sum ikki kann rúmast í uppskrivingargrunninum, verður innroknað í rakstrarroknskapin.

Dagsvirði á grundøki og bygningum verður ásett við støði í meting frá einum uttanhýsis metingarmanni.

Onnur materiell støðisogn verður virðisásett til kostprís við frádrátti av samlaðum av- og niðurskrivingum.

Avskrivingargrundarlagið er kostprísur við frádrátti av væntaðum restvirði eftir lokna nýtslutíð. Grundøki verða ikki avskrivað.

Kostprísur er útveganarprísur umframt kostnaðir, ið beinleiðis eru knýttir at útveganini til dagin, tá ið ognin er klár at taka í nýtslu. Fyri egnar framleiddar ognir fevnir kostprísurin um beinleiðis og óbeinleiðis kostnaðir til tilfar, deilir, undirútvegarar og løn.

Kostprísurin á eini ogn verður býttur sundur í serstakar partar, ið verða avskrivaðir hvør sær, um nýtslutíðin er ymisk fyri ymsu partarnar.

Avskrivingin er eins stór fyri tey einstøku roknskaparárini og er grundað á hesar metingar um nýtslutíðina á ognunum:

| | Brúkstíð | Restvirði |
|---|---|---|
| Grundøki og bygningar | 10-50 ár | 6 % |
| Rakstrartól, innbúgv og onnur støðisogn | 2-10 ár | 0 % |

Vinningur ella tap verða innroknað í rakstrarroknskapin undir ávikavist aðrar rakstrarinntøkur ella aðrar rakstrarkostnaðir.

# Nýttur roknskaparháttur

## Langleigusáttmálar

Langleigusáttmálar viðvíkjandi materiellari støðisogn, har felagið hevur allar týðandi váðar og fyrimunir tengdar at ognarrættinum (fíggjarlig langleiga), verða í fyrstu atløgu virðisásettir til lægsta virðið av dagsvirðinum av langleigaðu ognini og nútíðarvirðinum av framtíðar langleigukostnaðinum. Tá ið nútíðarvirðið verður roknað, verða annaðhvørt innanhýsis rentufóturin á langleiguavtaluni ella lánsrentan hjá felagnum nýtt sum diskoneringsfaktor. Fíggjarliga langleigaðar ognir verða síðani viðgjørdar sum aðrar støðisognir felagsins.

Kapitaliseraða restleiguskyldan verður innroknað í fíggjarstøðuna sum skuld, og rentuparturin av langleigugjaldinum verður innroknaður í rakstrarroknskapin yvir gildistíðina í sáttmálanum.

Allir aðrir langleigusáttmálar eru operationell langleiga. Gjøld í sambandi við operationellar langleigusáttmálar og aðrar leiguavtalur verða rakstrarførd yvir gildistíðina í sáttmálanum. Tann samlaða skyldan í sambandi við operationellar langleigu og leigusáttmálar verður upplýst undir eventualskyldum v.m.

## Vørugoymslur

Vørugoymslur verða virðisásettar til kostprís eftir FIFO háttinum. Er nettosøluvirðið lægri enn kostprísurin, verður goymslan niðurskrivað til hetta lægra virðið.

Kostprísur fyri handilsvørur, rávørur og hjálpitilfar fevnir um keypsprís umframt kostnað fyri at fáa vørurnar heim.

## Virðisminking av støðisogn

Árliga verður mett um, hvørt tað eru ábendingar um, at roknskaparliga virðið á immateriellari og materiellari støðisogn umframt kapitalpørtum í dótturfeløgum og leyst atknýttum feløgum er minkað meiri í virði enn tað, sum kemur til sjóndar í árligu avskrivingunum.

## Áogn

Áogn verður virðisásett til amortiseraðan kostprís.

Niðurskriving verður gjørd móti væntaðum tapi, tá ið tað verður mett at vera ein óvildug ábending um, at ein áogn ella áognarbólkur eru minkað í virði. Er ein óvildug ábending um, at ein einstøk áogn er virðisminkað, verður henda áogn niðurskrivað.

# Nýttur roknskaparháttur

## Arbeiði í gerð fyri fremmanda rokning

Arbeiði í gerð fyri fremmanda rokning verða virðisásett til søluvirðið av framda arbeiðinum. Søluvirðið verður uppgjørt við støði í, hvussu stórur partur av arbeiðinum er liðugur fíggjarstøðudagin og samlaðu væntaðu inntøkunum av einstaka arbeiðinum í gerð. Stigið fyri liðugtgerð verður gjørt upp sum parturin av staðfestum kostnaði í mun til samlaða metta kostnaðin á einstøka arbeiðinum í gerð.

Tá ið søluvirðið av einum arbeiði í gerð ikki kann gerast upp álítandi, verður søluvirðið virðisásett til staðfestan kostnað ella nettosøluvirðið, um hetta er lægri.

Tað einstaka arbeiðið í gerð verður innroknað í fíggjarstøðuna sum áogn ella skuld. Nettoognir fevna um samlaðu arbeiðini í gerð, har søluvirðið av framda arbeiðinum er hægri enn ávegisfaktureringin. Nettoskyldur fevna um arbeiði í gerð, har ávegisfaktureringin er hægri enn søluvirðið.

Kostnaðir í sambandi við søluarbeiði og at fáa í lag sáttmálar verða innroknaðir í rakstrarroknskapin, so hvørt sum hesir verða staðfestir.

## Tíðaravmarkingar

Tíðaravmarkingar, ið eru innroknaðar sum ogn í umferð, fevna um goldnar kostnaðir viðvíkjandi komandi roknskaparárum.

## Tøkur peningur

Tøkur peningur fevnir um tøkar peningaupphæddir.

## Virðisbrøv og kapitalpartar

Virðisbrøv og kapitalpartar, ið fevna um børsskrásett partabrøv og lánsbrøv, verða virðisásett til dagsvirði fíggjarstøðudagin. Ikki børsskrásett virðisbrøv verða virðisásett til dagsvirði grundað á eitt roknað kapitalvirði.

## Uppskrivingargrunnur

Í uppskrivingargrunni undir eginognini verða innroknaðar uppskrivingar av bygningum frádrigið útsettan skatt. Grunnurin minkar í sambandi við afturføring av uppskrivingum og/ella sølu av bygningum.

# Nýttur roknskaparháttur

## Vinningsbýti

Vinningsbýti, sum leiðslan skjýtur upp at útluta fyri roknskaparárið, verður innroknað sum ein skylda.

## Partafelagsskattur og útsettur skattur

Skyldugur skattur og skattaáogn verða innroknað í fíggjarstøðuna sum roknaður skattur av ársins skattskyldugu inntøku javnað fyri skatt av skattskyldugum inntøkum undanfarin ár.

Útsettur skattur verður virðisásettur eftir fíggjarstøðu skuldarháttinum av øllum fyribils munum millum roknskaparligu og skattligu virðini av ognum og skyldum.

Útsettur skattur verður virðisásettur við støði í teimum skattareglum og skattastigum, sum við galdandi lóg fíggjarstøðudagin verða galdandi, tá ið tann útsetti skatturin væntandi skal gjaldast.

## Skyldur

Við lántøku verða fíggjarligar skyldur innroknaðar við eini upphædd svarandi til móttiknu upphæddina frádrigið transaktiónskostnaðir. Seinni verða fíggjarligu skyldurnar virðisásettar til amortiseraðan kostprís svarandi til kapitaliseraða virðið við nýtslu av effektivu rentuni, soleiðis at munurin millum móttiknu upphæddina og áljóðandi virðið verður innroknaður í rakstrarroknskapin yvir lánitíðarskeiðið.

Fíggjarligu skyldurnar fevna eisini um kapitaliseraðu restlangleiguskylduna av fíggjarligum langleiguavtalum.

Aðrar skyldur verða virðisásettar til nettorealisationsvirði.

## Tíðaravmarkingar

Tíðaravmarkingar fevna um móttiknar gjaldingar viðvíkjandi inntøkum í komandi roknskaparárium.

## Umrokning av fremmandum gjaldoyra

Transaktiónir í fremmandum gjaldoyra verða í fyrstu atløgu umroknaðar til kursin transaktiónsdagin. Gjaldoyramunir, ið íkoma millum kursin transaktiónsdagin og kursin gjalddagin, verða innroknaðir í rakstrarroknskapin sum ein fíggjarlig upphædd.

## Nýttur roknskaparháttur

Áogn, skuld og aðrar peningaligar upphæddir í fremmandum gjaldoyra verða umroknaðar til gjaldoyrakursin fíggjarstøðudagin. Munurin millum kursin fíggjarstøðudagin og kursin tann dagin, tá ið áognin ella skuldin íkom ella innroknaðu/ognarførdu upphæddina í seinasta ársroknskapi, verður innroknaður í rakstrarroknskapin undir fíggjarligum inntøkum og útreiðslum.

Støðisogn, ið er keypt í fremmandum gjaldoyra, verður innroknað til kursin keypsdagin.

## Peningastreymsuppgerð

Peningastreymsuppgerðin vísir peningastreymar felagsins í árinum býtt á økini rakstrar-, íløgu- og fíggingarvirksemi í árinum, broytingar í tøkum peningi í árinum umframt tøka pening felagsins við ársbyrjan og ársenda.

Ávirkanin á tøkan pening í sambandi við keyp og sølu av feløgum verður víst serskilt undir peningastreymi frá íløguvirksemi. Peningastreymar frá keyptum feløgum verða tiknir við í peningastreymsuppgerðina frá keypsdegnum, og peningastreymar viðvíkjandi seldum feløgum verða tiknir við fram til søludagin.

**Peningastreymur frá rakstrarvirksemi**

Peningastreymur frá rakstrarvirkseminum verður uppgjørdur sum ársins úrslit javnað fyri ikki kontantar rakstrarupphæddir, broytingar í arbeiðskapitali umframt goldnum partafelagsskatti.

**Peningastreymur frá íløguvirksemi**

Peningastreymur frá íløguvirkseminum fevnir um gjøld í sambandi við keyp og sølu av feløgum og virksemi umframt keyp og sølu av immateriellari, materiellari og fíggjarligari støðisogn.

**Peningastreymur frá fíggingarvirksemi**

Peningastreymur frá fíggingarvirkseminum fevnir um broytingar í støðd ella samanseting av felagskapitali felagsins og kostnaðum knýttum at hesum umframt upptøku av lánum, gjaldan av avdráttum á rentuberandi skuld og útgjaldi av vinningsbýti til partaeigarar.

**Tøkur peningur**

Tøkur peningur fevnir um tøkar peningaupphæddir og stuttfreistað virðisbrøv við eini gildistíð upp á minni enn 3 mánaðir, og sum uttan forðing kunnu umbýtast til tøkan pening, og har vandin fyri virðisbroytingum er ótýðandi.

# Nýttur roknskaparháttur

**Yvirlit yvir høvuðs- og lyklatøl**

Frágreiðing til lykatølini.

| | |
|---|---|
| Høvuðsavkast | $\frac{\text{Úrslit áðrenn fíggjarpostar x 100}}{\text{Ognir til samans}}$ |
| Tryggleikastig | $\frac{\text{Eginogn ultimo x 100}}{\text{Ognir til samans við árslok}}$ |
| Eginpeningsavkast | $\frac{\text{Vanlig úrslit eftir skatt x 100}}{\text{Miðal eginogn}}$ |
| Gjaldførislutfall | $\frac{\text{Ogn í umferð x 100}}{\text{Stuttfreistað skuld}}$ |

# Rakstrarroknskapur 1. januar - 31. desember 2025

| | Nota | 2025 | 2024 |
|---|---|---|---|
| | | kr. | tkr. |
| **Bruttoúrslit** | | **77.157.458** | **66.703** |
| Starvsfólkakostnaður | 1 | -55.497.854 | -47.964 |
| Av- og niðurskrivingar | 3 | -5.064.186 | -2.829 |
| **Úrslit áðrenn fíggjarpostar** | | **16.595.418** | **15.910** |
| Fíggjarligar inntøkur | | 365 | 10 |
| Fíggjarligir kostnaðir | | -500.337 | -258 |
| **Úrslit áðrenn skatt** | | **16.095.446** | **15.662** |
| Skattur av ársúrslitinum | 2 | -2.909.745 | -2.835 |
| **Ársúrslit** | | **13.185.701** | **12.827** |

| | | |
|---|---|---|
| **Uppskot til yvirskotsbýti** | | |
| Uppskot til vinningsbýti | 5.300.000 | 5.100 |
| Flutt úrslit | 7.885.701 | 7.727 |
| | **13.185.701** | **12.827** |

# Fíggjarstøða tann 31. desember 2025

| | Nota | 2025<br>kr. | 2024<br>tkr. |
|---|---|---|---|
| **Ogn** | | | |
| Grundøki og bygningar | | 34.204.857 | 34.815 |
| Rakstrartól, innbúgv og onnur støðisogn | | 14.457.306 | 10.502 |
| **Materiell støðisogn** | 3 | **48.662.163** | **45.317** |
| **Støðisogn til samans** | | **48.662.163** | **45.317** |
| Liðugtvørur og handilsvørur | | 180.458 | 202 |
| **Vørugoymslur** | | **180.458** | **202** |
| Áogn av sølu og tænastum | | 16.228.571 | 12.335 |
| Onnur áogn | | 242.338 | 304 |
| Tíðaravmarkingar | | 8.203.318 | 8.712 |
| **Áogn** | | **24.674.227** | **21.351** |
| Virðisbrøv | | 1.423 | 1 |
| **Virðisbrøv** | | **1.423** | **1** |
| **Tøkur peningur** | | **31.775.301** | **30.245** |
| **Ogn í umferð til samans** | | **56.631.409** | **51.799** |
| **Ogn til samans** | | **105.293.572** | **97.116** |

# Fíggjarstøða tann 31. desember 2025

| | Nota | 2025<br>kr. | 2024<br>tkr. |
|---|---|---|---|
| **Skyldur** | | | |
| Felagskapitalur | | 6.702.000 | 6.702 |
| Uppskrivingargrunnur | | 12.618.710 | 12.619 |
| Fluttur vinningur | | 50.364.901 | 42.479 |
| **Eginogn** | 4 | **69.685.611** | **61.800** |
| Útsettur skattur | | 528.578 | 132 |
| **Avsetingar til samans** | | **528.578** | **132** |
| Langleiguskyldur | | 1.729.764 | 4.668 |
| **Langfreistað skuld** | 5 | **1.729.764** | **4.668** |
| Stuttfreistaður partur av langfreistaðari skuld | 5 | 2.948.833 | 2.782 |
| Peningastovnar | | 128.661 | 115 |
| Undangoldið frá kundum | | 2.953.678 | 3.967 |
| Vøru- og tænastuskuld | | 4.908.576 | 5.977 |
| Partafelagsskattur | | 2.512.944 | 2.637 |
| Onnur skuld | | 11.688.889 | 9.938 |
| Tíðaravmarkingar | | 2.908.038 | 0 |
| Uppskot til vinningsbýti fyri roknskaparárið | | 5.300.000 | 5.100 |
| **Stuttfreistað skuld** | | **33.349.619** | **30.516** |
| **Skuld til samans** | | **35.079.383** | **35.184** |
| **Skyldur til samans** | | **105.293.572** | **97.116** |
| Veðsetingar og trygdarveitingar | 6 | | |
| Nærstandandi partar og ognarviðurskifti | 7 | | |

# Peningastreymsuppgerð 1. januar - 31. desember 2025

| | Nota | 2025 | 2024 |
|---|---|---|---|
| | | kr. | tkr. |
| Ársúrslit | | 13.185.701 | 12.827 |
| Javningar | 8 | 8.473.903 | 6.162 |
| Broyting í rakstrarkapitali | 9 | -724.676 | -5.688 |
| **Peningastreymur frá rakstri áðrenn fíggjarpostar** | | **20.934.928** | **13.301** |
| Rentuinngjaldingar og líknandi | | 365 | 9 |
| Rentuútgjaldingar og líknandi | | -500.337 | -258 |
| **Peningastreymur frá vanligum rakstri** | | **20.434.956** | **13.052** |
| Goldin partafelagsskattur | | -2.636.982 | -3.265 |
| **Peningastreymur frá rakstrarvirksemi** | | **17.797.974** | **9.787** |
| Keyp av materiellari støðisogn | | -8.409.301 | -12.518 |
| **Peningastreymur frá íløguvirksemi** | | **-8.409.301** | **-12.518** |
| Niðurgjalding av langleiguskyldum | | -2.771.274 | -1.327 |
| Upptøku av langleiguskyldum | | 0 | 8.777 |
| Goldið vinningsbýti | | -5.100.000 | -2.700 |
| **Peningastreymur frá fíggingarvirksemi** | | **-7.871.274** | **4.750** |
| **Broyting í tøkum peningi** | | **1.517.399** | **2.019** |
| Tøkur peningur | | 30.244.665 | 28.196 |
| Kassakredittur | | -115.424 | -85 |
| Tøkur peningur 1. januar 2025 | | 30.129.241 | 28.111 |
| **Tøkur peningur 31. desember 2025** | | **31.646.640** | **30.130** |
| Tøkur peningur kann sundurgreinast soleiðis: | | | |
| Tøkur peningur | | 31.775.301 | 30.245 |
| Kassakredittur | | -128.661 | -115 |
| **Tøkur peningur 31. desember 2025** | | **31.646.640** | **30.130** |

# Notur til ársfrásøgnina

| | | 2025 | 2024 |
|---|---|---:|---:|
| | | kr. | tkr. |
| **1** | **Starvsfólkakostnaður** | | |
| | Lønir | 46.561.692 | 40.358 |
| | Eftirlønartryggingar | 5.768.452 | 4.713 |
| | Onnur lønartengd gjøld | 3.167.710 | 2.893 |
| | | **55.497.854** | **47.964** |
| | **Av hesum er samsýning til stjórn og nevnd** | **1.885** | **1.543** |
| | Starvsfólkatal í miðal | 67 | 65 |
| **2** | **Skattur av ársúrslitinum** | | |
| | Partafelagsskattur | 2.512.944 | 2.637 |
| | Útsettur skattur í árinum | 396.801 | 198 |
| | | **2.909.745** | **2.835** |

# Notur til ársfrásøgnina

## 3 Materiell støðisogn

| | Grundøki og bygningar | Rakstrartól, innbúgv og onnur støðisogn | Til samans |
|---|---|---|---|
| Keypsvirði 1. januar 2025 | 36.921.554 | 14.847.371 | 51.768.925 |
| Tilgongd í árinum | 829.789 | 7.579.512 | 8.409.301 |
| Frágongd í árinum | 0 | -643.328 | -643.328 |
| Keypsvirði | 37.751.343 | 21.783.555 | 59.534.898 |
| Uppskriving 1. januar 2025 | 14.717.000 | 0 | 14.717.000 |
| Uppskriving | 14.717.000 | 0 | 14.717.000 |
| Av- og niðurskrivingar 1. januar 2025 | 16.823.932 | 4.344.944 | 21.168.876 |
| Avskrivingar í árinum | 1.439.554 | 3.624.632 | 5.064.186 |
| Afturførdar avskrivingar upp á seldar ognir | 0 | -643.327 | -643.327 |
| Av- og niðurskrivingar | 18.263.486 | 7.326.249 | 25.589.735 |
| **Roknskaparligt virði 31. desember 2025** | **34.204.857** | **14.457.306** | **48.662.163** |
| Uppskrivingar við frádrátti av gjørdum av- og niðurskrivingum | 8.781.749 | 0 | |
| **Roknskaparligt virði 31. desember 2025 áðrenn uppskriving** | **25.423.108** | **14.457.306** | |
| Roknskaparligt virði langtíðarleigað ogn | 0 | 6.436.738 | |

# Notur til ársfrásøgnina

## 4 Eginogn

| | Felags-kapitalur | Uppskrivingar grunnur | Fluttur vinningur | Til samans |
|---|---|---|---|---|
| Salda 1. januar 2025 | 6.702.000 | 12.618.710 | 42.479.200 | 61.799.910 |
| Ársúrslit | 0 | 0 | 13.185.701 | 13.185.701 |
| Uppskot til vinningsbýti | 0 | 0 | -5.300.000 | -5.300.000 |
| **Eginogn** | **6.702.000** | **12.618.710** | **50.364.901** | **69.685.611** |

Felagskapitalurin fevnir um 6.702.000 partabrøv á áljóðandi kr. 1. Eingin partabrøv hava serlig rættindi.

Ongar broytingar hava verið í felagskapitalinum seinastu 5 árini.

## 5 Langfreistað skuld

| | Skuld 1. januar 2025 | Skuld 31. desember 2025 | Avdráttur komandi ár | Restskuld eftir 5 ár |
|---|---|---|---|---|
| Langleiguskyldur | 7.449.871 | 4.678.597 | 2.948.833 | 0 |
| | **7.449.871** | **4.678.597** | **2.948.833** | **0** |

## 6 Veðsetingar og trygdarveitingar

Í grundøki og bygningi felagsins við einum roknskaparligum virði á 34,3 mió.kr., eru veðsett ognarveðbrøv á til samans 56,0 mió.kr.

Felagið hevur umvegis peningastovn veitt tollábyrgd fyri til samans 350 tkr.

# Notur til ársfrásøgnina

## 7 Nærstandandi partar og ognarviðurskifti

**Handlar**

Allar transaktiónir felagsins við nærstandandi partar eru framdar til marknaðartreytir.

| | 2025 | 2024 |
|---|---:|---:|
| | kr. | tkr. |
| **8 Peningastreymsuppgerð javningar** | | |
| Fíggjarligar inntøkur | -365 | -9 |
| Fíggjarligir kostnaðir | 500.337 | 258 |
| Av- og niðurskrivingar íroknað tap og vinning við sølu | 5.064.186 | 3.078 |
| Skattur av ársúrslitinum | 2.909.745 | 2.835 |
| | **8.473.903** | **6.162** |

## 9 Peningastreymsuppgerð – broyting í rakstrarkapitali

| | | |
|---|---:|---:|
| Broyting í vørugoymslum | 21.268 | 29 |
| Broyting í áogn | -3.322.533 | -9.561 |
| Broyting í útvegarum v.m. | 2.576.589 | 3.844 |
| | **-724.676** | **-5.688** |